# Pensjóns- og tryggingaravtala millum

## Hjálparfólkafelagið

## &

## Betri Pensjón

betri

01.03.2021

betri

# INNIHALDSYVIRLIT


§1: FORMKRØV ..... 3

STK. 1 AVTALUPARTAR ..... 3
STK. 2 AVTALUGRUNDARLAG ..... 3
STK. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN ..... 3
STK. 4 UPPTØKUTREYTIR ..... 4
STK. 5 INNLIMAN & FRÁGONGD ..... 4
STK. 6 PENSJÓNS- OG TRYGGINGARGJALD ..... 5
STK. 7 ÍSKOYTISTRYGGINGAR ..... 5
STK. 8 TILSKILAN ..... 5
STK. 9 FARLOYVI ..... 6
STK. 10 OGNARVIÐURSKIFTI ..... 6
STK. 11 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI ..... 6
STK. 12 AFTURKEYP ..... 6
STK. 13 SKATTUR OG AVGJØLD ..... 6
STK. 14 FRÁBOÐAN ..... 6

§2: BÓLKATRYGGING ..... 7

STK. 1 LÍVSTRYGGING ..... 7
STK. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING ..... 7
STK. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING ..... 7
STK. 4 TILLAGAN AV TRYGGINGARGJØLDUM ..... 8

§ 3: ÍSKOYTISTRYGGINGAR ..... 8

STK. 1 LÍVSTRYGGING ..... 8
STK. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING ..... 8
STK. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING ..... 8
STK. 4 HÁMARK FYRI ÁRLIGU ÓARBEIÐSFØRISTRYGGINGINA ..... 9

§ 4: PENSJÓNSSAMANSPARING ..... 9

STK. 1 PENSJÓNSSAMANSPARING ..... 9
STK. 2 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI ..... 10

§ 5: ANNAÐ ..... 10

STK. 1 ÓSEMJA ..... 10
STK. 2 SÁTTMÁLAPARTAR - ÍGILDISKOMA ..... 11
FYLGISKJAL 1 ..... 12

betri

# §1: FORMKRØV

## Stk. 1 AVTALUPARTAR

Tryggingaravtalan er gjørd millum Betri Pensjón og Hjálparfólkafelagið, avtalan fevnir um limir hjá Hjálparfólkafelagnum.

Avtalan er býtt í tveir bólkar

- Bólkur 1: Limir, sum hava eitt mánaðarligt inngjald á í minsta lagi kr. 900, eftir skatt. Lívs-, Bráðsjúku-, og óarbeiðisføristrygging.

- Bólkur 2: limir, sum hava eitt mánaðarligt inngjald, sum er minni enn kr. 900, eftir skatt. Lívs-, og Bráðsjúkutrygging.

Fyrsta inngjaldið hjá liminum ásetur, í hvørjum bólki hann verður tryggjaður.

Broytist mánaðarliga inngjaldið, kann Betri Pensjón, eftir áheitan frá liminum, broyta bólk.

Limurin fær tryggingar/pensjónsprógv sendandi frá Betri Pensjón.

Hjálparfólkafelagið fær yvirlit frá Betri Pensjón javnan, sum vísir hvørjir limir eru í hvørjum bólki.

Skipanin er bundin fyri limirnar hjá Hjálparfólkafelagnum.

## Stk. 2 AVTALUGRUNDARLAG

Afturat ásetingunum í avtaluni galda reglurnar í almennu tryggingartreytunum hjá Betri Pensjón, Tryggingaravtalulógini, Rentutryggingarlógini, Eftirlønarlógini og øðrum viðkomandi lógum.

Tryggingarnar verða roknaðar á útrokningargrundarlagnum hjá Betri Pensjón.

## Stk. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN

Avtalan hevur gildi frá 1. mars 2021. Aðrar avtalur fara við hesari úr gildi.

Avtalan er galdandi fyri eitt ár í senn, men heldur fram um ikki annað er avtalað. Báðir partar kunnu - við 3 mánaða freist - siga avtaluna upp við skrivligari ávaring til tann 1. í einum mánaði.

Verður avtalan uppsøgd, fara allar tryggingar, sum eru teknaðar undir avtaluni, úr gildi sama dag, sum avtalan fer úr gildi.

Limurin hevur tá møguleika fyri at halda fram við sjálvstøðugari trygging, við somu upphæddum, sum eru galdandi í hesi avtalu, uttan at kravdar verða nýggjar heilsuupplýsingar. Tó skulu limir hava verið í tryggingini í minsta lagi í 1 ár. Tá verður tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

## Stk. 4 UPPTØKUTREYTIR

Treytin fyri upptøku eftir hesum sáttmála er, at limurin er fyltur 18 ár og ikki 67 ár, tá ið tryggingin verður teknað, og at persónarnir eru limir í Hjálparfólkafelagnum og hava fullan arbeiðsførleika.

Er limur settur í vart/tillagað starv, skal hetta fráboðast Betri Pensjón. Í slíkum førum verður støða tikin til innliman í hvørjum einstøkum føri.

Betri Pensjón sendir oyðublað til limin um at vátta limaskapin og at limur hevur fullan arbeiðsførleika. Tá Betri Pensjón hevur móttikið hesa váttan, verða tryggingarnar skrásettar. Sí fylgiskjal 2.

Hetta er galdandi við innliman av nýggjum limum, eftir 01.03.2021. Limir sum eru komnir í avtaluna áðrenn 01.03.2021. varðveita sínar tryggingarupphæddir, treytað av, at tey hava latið inn arbeiðsførleikaváttan.

## Stk. 5 INNLIMAN & FRÁGONGD

Pensjónsskipanin fevnir um allar limir hjá Hjálparfólkafelagnum, treytað av at Betri Pensjón móttekur pensjónsinngjald fyri limin.

Hjálparfólkafelagið boðar Betri Pensjón skrivliga frá til- og frágongdini leypandi. Fráboðanin skal bert innihalda teir limir, sum skulu inn ella úr skipanini.

Fyri nýggjar limir skal limaskapur og arbeiðsførleikin váttast, vísandi til ásetingar í stk. 4.

Í sambandi við innliman av nýggjum limi verður upplýst navn, bústaður, postnummar, býur/bygd, p-tal og ígildiskomudagur.

## Stk. 6 PENSJÓNS- OG TRYGGINGARGJALD

Pensjóns- og tryggingargjaldið verður inngoldið umvegis lønarportalin av arbeiðsgevara í sambandi við lønarútgjalding.

Fyri limir í bólki 1 verður tryggingargjaldið rindað av pensjónsgjaldinum, meðan limir í bólki 2, sjálvir rinda fyri tryggingarnar.

Gjaldið steðgar tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur fylt 67 ár.

Doyr limurin, áðrenn pensjónin fellur til gjaldingar, fellur pensjónsgjaldið burtur frá 1. í mánaðinum eftir at limurin doyði.

## Stk. 7 ÍSKOYTISTRYGGINGAR

Um limur ynskir at gera ískoytistryggingar, verður einstaklingaavtala gjørd við Betri Pensjón.

Einstaklingaavtalur viðføra, at Betri Pensjón krevur persónliga heilsuváttan, og aðrar treytir annars kunnu koma at galda fyri henda partin.

## Stk. 8 TILSKILAN

Um annað ikki er fráboðað Betri Pensjón, verður útgoldið til "næsta avvarðandi".

Hugtakið "næsti avvarðandi" fevnir í fyrstu atløgu um hjúnafelagan. Um eingin hjúnafelagi er, verður útgoldið til lívsarvingar, t.v.s. børnini. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært testamenti. Er einki testamenti, verður útgoldið sambæt arvalógini.

Tá útgoldið verður sambært tilskilan, verður útgoldið uttan um búgvið. Her kunnu kravánarar (kreditorar) ikki gera krav í upphæddunum.

Er ynski um at broyta tilskilan, skal hetta fráboðast skrivliga til Betri Pensjón. Á heimasíðuni www.betri.fo liggur skjalið "Tilskilan", sum verður fylt út og sent til Betri Pensjón.

betri

## Stk. 9 FARLOYVI

Um limur fer í farloyvi, tekur Hjálparfólkafelagið støðu til, um viðkomandi framhaldandi skal verða fevndur av bólkatryggingini í farloyvisskeiðnum. Er talan um limir, sum eisini hava óarbeiðsføristrygging, verður avtalað við Betri Pensjón hvørjar tryggingar limurin skal hava í farloyvistíðarskeiðnum. Tá verður tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

## Stk. 10 OGNARVIÐURSKIFTI

Pensjónsskipanin er ogn hjá liminum.

Um farið verður í annað starv, sum liggur uttanfyri sáttmálaøkið, kann limurin taka pensjónssamansparingina við sær, antin í aðra avtalu hjá Betri Pensjón ella til annan veitara.

## Stk. 11 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI

Um limur fer í annað starv, ella á annan hátt ikki lýkur upptøkutreytirnar í hesi avtalu, skal hetta fráboðast Betri Pensjón skjótast gjørligt.

Limurin kann venda sær til Betri Pensjón og avtala, hvussu tryggingaravtalan skal halda fram. Møguligt er at halda fram við sama innihaldi, sum er galdandi fyri hesa avtalu. Tó verða tryggingargjøld og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar, sí ásetingar í stk. 3.

## Stk. 12 AFTURKEYP

Afturkeyp av samansparda virðinum kann einans fara fram í tráð við galdandi reglur í Rentutryggingarlógini og Eftirlønarlógini.

## Stk. 13 SKATTUR OG AVGJØLD

Skattur og avgjald verða roknað í mun til galdandi reglur í Rentutryggingar- og Eftirlønarlógini.

## Stk. 14 FRÁBOÐAN

Betri Pensjón kunnar TAKS um tey viðurskifti, sum fráboðanarskyldan ásetur í sambandi við pensjónssamansparingar.

betri

## §2: BÓLKATRYGGING

### Stk. 1 LÍVSTRYGGING

Verður útgoldin, um limurin doyr, áðrenn fylta 67. ár.

Tryggingarupphæddin er **kr. 600.000,-**, og broytist sum sæst niðanfyri:

| **Aldur** | **Upphædd** |
|---|---|
| Til og við 49 ár | kr. 600.000 |
| 50 – 59 ár | kr. 500.000 |
| 60 – 66 ár | kr. 400.000 |

### Stk. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING

Um limurin fær eina av bráðsjúkunum, ið eru nevndar í tryggingartreytunum fyri bráðsjúku, fær viðkomandi útgoldið eingangsupphædd á **kr. 125.000,-.** Bráðsjúkan skal verða staðfest, áðrenn limurin er fyltur 67 ár. Møguligt útgjald verður ikki mótroknað í veitingini við deyða.

Fær limurin aðra bráðsjúku enn fyrr staðfestu, hevur limurin rætt til enn eitt útgjald á kr. 125.000,-. Fær limurin staðfest somu bráðsjúku ella beinleiðis avleiddar bráðsjúkur til fyrr staðfestu, gevur hetta ikki rætt til nýtt útgjald.

**Børn** hjá liminum upp til 18 ár, ið er fevndur av hesi avtaluni, eru eisini fevnd av bráðsjúkutrygging. Bráðsjúkutryggingin fevnir eisini um ættleidd børn og fosturbørn hjá liminum. Fosturbørn, treytað av, at hesi eru skrásett at búgva á sama bústaði sum limurin. Útgoldið verður í samband við tær bráðsjúkurnar, ið nevndar eru í tryggingartreytunum fyri bráðsjúku. Tryggingarupphæddin er **kr. 125.000,-.**

### Stk. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING

Árliga tryggingarveitingin er ásett til **kr. 36.000,-.** Útgoldið verður, um limurin í tryggingarskeiðnum gerst 2/3 ella meira óarbeiðsførur. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum eftir 3 mánaða óarbeiðsføri. Fyrstu ferð tann 1. í mánaðinum, eftir at 3 mánaða skeiðið er lokið. Tryggingarveitingin verður útgoldin, so leingi óarbeiðsførið stendur við, og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til fylta 67 ár. Óarbeiðsførið skal vera staðfest, áðrenn limurin er fyltur 67 ár.

Óarbeiðsføristrygging er bert galdandi fyri limir, eftir áseting í § 1 stk. 1.

betri

**Stk. 4 TILLAGAN AV TRYGGINGARGJØLDUM**

Allar bólkatryggingar verða gjørdar fyri 1 ár í senn. Gjaldið verður eftirmett 1. januar á hvørjum ári.

## § 3: ÍSKOYTISTRYGGINGAR

Velur limur at tekna trygging afturat bólkatryggingini, kann limurin velja at tekna hægri tryggingarupphæddir enn tær, sum ásettar eru í bólkatryggingini. Tá verða tær upphæddir, sum liggja omanfyri avtalaðu bólkatryggingina teknaðar á einstaklinga-grundarlagi. Hesar kunnu fevna um lívs-, bráðsjúku-, óarbeiðsføristrygging.

**Stk. 1 LÍVSTRYGGING**

Limurin ásetur tryggingarupphæddina við innliman, tó kann hann ikki tekna meiri enn íalt kr. 4.000.000.

**Stk. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING**

Limurin ásetur tryggingarupphæddina við innliman, tó kann hann ikki tekna meiri enn íalt kr. 200.000.

**Stk. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING**

Limurin ásetur árligu tryggingarveitingina við innliman.

Tryggingarveitingin kann í mesta lagi vera 80% av lønini eftir skatt. Hægst loyvda tryggingarveiting við óarbeiðsføri, her verður víst til § 3, stk. 5.

Møguleiki er fyri at broyta valdu tryggingarveitingina í tryggingartíðarskeiðnum.

Útgoldið verður, um limurin í tryggingarskeiðnum gerst 2/3 ella meira óarbeiðsførur. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum eftir 3 mánaða óarbeiðsføri. Fyrstu ferð tann 1. í mánaðinum, eftir at 3 mánaða skeiðið er lokið. Tryggingarveitingin verður útgoldin, so leingi óarbeiðsførið stendur við, og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til ásettan eftirlønaraldur. Óarbeiðsførið skal vera staðfest, áðrenn limurin er fyltur 60 ár.

Treytin fyri, at tryggingin kann fevna um óarbeiðsførisveiting er, at limurin ikki er fyltur 60 ár, tá tryggingin verður teknað.

### Stk. 4 HÁMARK FYRI ÁRLIGU ÓARBEIÐSFØRISTRYGGINGINA

Galdandi er, at samlaða árliga veitingin við óarbeiðsføristrygging ikki er hægri enn kr. 300.000,-.

## § 4: PENSJÓNSSAMANSPARING

### Stk. 1 PENSJÓNSSAMANSPARING

Inngjøld fylgja Eftirlønarlógini.

Pensjónin verður útgoldin tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin nær fólkapensjónsaldur p.t. 67 ár (2021).

Spart verður saman á kapitalgrundarlagi. Útgoldið verður sambært Eftirlønarlógini galdandi frá 01.01.2014.

Útgjaldingarhátturin fyri pensjónina er:

- Min. 45% Lívrenta
- Max 55% Lutapensjón, yvir í minsta lagi 10 ár
- Max 15% Kapitalpensjón

Tó kann Lívrentan ongantíð verða kravd at vera hægri enn 40% av eini arbeiðaraløn, brutto, sbrt. sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Upphædd, ið er omanfyri ta kravdu Lívrentuna, kann flytast til Lutapensjón, um eftirlønaravtalan loyvir hesum.

Er samlaða eftirlønarsamansparingin hjá øllum føroyskum eftirlønarveitarum tilsamans minni enn kr. 400.000 við eftirlønaraldur, kunnu upp til kr. 60.000 rindast út í einum (kapitalútgjald), og restin verður útgoldið við upp til kr. 2.500 um mánaðin.

Upphæddirnar, sum eru ásettar verða árliga javnaðar í mun til prístalið 1. juli 2013, sum verður sett til 100.

**Stk. 2 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI**

Samansparingin verður rentað við marknaðarrentu.

Um ikki annað er avtalað, verður samansparingin sett í "Varið váðastøði" við innliman.

Limurin kann síðani velja millum hesar íløgubólkar

- bert lánsbrøv
- varið váðastøði (láns- & partabrøv)
- lágt váðastøði (láns- & partabrøv)
- miðal váðastøði (láns- & partabrøv)
- høgt váðastøði (láns- & partabrøv)
- bert partabrøv

Ynskir limurin seinni at broyta íløgubólk, er hetta møguligt. Broyting av íløgubólki kann gerast pr. tann 1. í einum mánaði. Hetta skal fráboðast í mánaðinum frammanundan. Tað er ókeypis at broyta íløgubólk.

Avkastið av samansparingini, t.v.s. miðalrentan av tí valda íløgubolkinum, verður tilskrivað mánaðarliga á pensjónskontu hjá liminum.

**Stk. 3 LUTFALL MILLUM LÁNSBRØV OG PARTABRØV**

Lutfallið millum lánsbrøv og partabrøv er tengt at aldrinum hjá einstaka liminum, sum víst í fylgiskjali nr. 1.

## § 5: ANNAÐ

**Stk. 1 ÓSEMJA**

Eru viðurskifti, fevnd av hesum sáttmála, sum limurin er ónøgdur við, kann limurin venda sær til tryggingarkærunevndina.

Ein treyt fyri at reisa mál fyri kærunevndina er, at limurin fyrst hevur roynt at fáa í lag eina nøktandi loysn við Betri Pensjón. Eydnast tað ikki, skal skrivlig kæra - skrivað á donskum - sendast kærunevndini saman við ávísum gjaldi. Um limurin fær heilt ella partvíst viðhald, verður gjaldið afturrindað.

Eftir umbøn frá liminum sendir Betri Pensjón útfyllingarblað í sambandi við kæru. Betri Pensjón er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

betri

| | |
|---|---|
| Kæran skal sendast til: | Ankenævnet for Forsikring<br>Anker Heegaards Gade 2, 1.<br>DK-1572 København V.<br>Tel. +45 33 15 89 00 |

**Stk. 2 SÁTTMÁLAPARTAR - ÍGILDISKOMA**

Tryggingar- og pensjónsavtalan er gjørd millum Betri Pensjón og Hjálparfólkafelagið.

Avtalan er skrivað í tveimum einsljóðandi eintøkum og hevur gildið frá 1. mars 2021. Báðir partar kunnu uppsiga avtaluna við 3 mánaða freist fram til tann 1. í einum mánaði.

| | |
|---|---|
| Tórshavn, tann 25/2-21 | Tórshavn, tann |
| BETRI PENSJÓN | HJÁLPARFÓLKAFELAGIÐ |

betri

## FYLGISKJAL 1

Galdandi býtið millum láns- og partabrøv í mun til íløgupuljur (2021)

| | Varið | | Lágt | | Miðal | | Høgt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aldur | Partabrøv | Lánsbrøv | Partabrøv | Lánsbrøv | Partabrøv | Lánsbrøv | Partabrøv | Lánsbrøv |
| 34 | 30,0 | 70,0 | 50 | 50 | 75 | 25 | 100 | 0 |
| 35 | 29,4 | 70,6 | 48,91 | 51,09 | 73,28 | 26,72 | 97,81 | 2,19 |
| 36 | 28,8 | 71,3 | 47,81 | 52,19 | 71,56 | 28,44 | 95,63 | 4,38 |
| 37 | 28,1 | 71,9 | 46,72 | 53,28 | 69,84 | 30,16 | 93,44 | 6,56 |
| 38 | 27,5 | 72,5 | 45,63 | 54,38 | 68,13 | 31,88 | 91,25 | 8,75 |
| 39 | 26,9 | 73,1 | 44,53 | 55,47 | 66,41 | 33,59 | 89,06 | 10,94 |
| 40 | 26,3 | 73,8 | 43,44 | 56,56 | 64,69 | 35,31 | 86,88 | 13,13 |
| 41 | 25,6 | 74,4 | 42,34 | 57,66 | 62,97 | 37,03 | 84,69 | 15,31 |
| 42 | 25,0 | 75,0 | 41,25 | 58,75 | 61,25 | 38,75 | 82,50 | 17,50 |
| 43 | 24,4 | 75,6 | 40,16 | 59,84 | 59,53 | 40,47 | 80,31 | 19,69 |
| 44 | 23,8 | 76,3 | 39,06 | 60,94 | 57,81 | 42,19 | 78,13 | 21,88 |
| 45 | 23,1 | 76,9 | 37,97 | 62,03 | 56,09 | 43,91 | 75,94 | 24,06 |
| 46 | 22,5 | 77,5 | 36,88 | 63,13 | 54,38 | 45,63 | 73,75 | 26,25 |
| 47 | 21,9 | 78,1 | 35,78 | 64,22 | 52,66 | 47,34 | 71,56 | 28,44 |
| 48 | 21,3 | 78,8 | 34,69 | 65,31 | 50,94 | 49,06 | 69,38 | 30,63 |
| 49 | 20,6 | 79,4 | 33,59 | 66,41 | 49,22 | 50,78 | 67,19 | 32,81 |
| 50 | 20,0 | 80,0 | 32,50 | 67,50 | 47,50 | 52,50 | 65,00 | 35,00 |
| 51 | 19,4 | 80,6 | 31,41 | 68,59 | 45,78 | 54,22 | 62,81 | 37,19 |
| 52 | 18,8 | 81,3 | 30,31 | 69,69 | 44,06 | 55,94 | 60,63 | 39,38 |
| 53 | 18,1 | 81,9 | 29,22 | 70,78 | 42,34 | 57,66 | 58,44 | 41,56 |
| 54 | 17,5 | 82,5 | 28,13 | 71,88 | 40,63 | 59,38 | 56,25 | 43,75 |
| 55 | 16,9 | 83,1 | 27,03 | 72,97 | 38,91 | 61,09 | 54,06 | 45,94 |
| 56 | 16,3 | 83,8 | 25,94 | 74,06 | 37,19 | 62,81 | 51,88 | 48,13 |
| 57 | 15,6 | 84,4 | 24,84 | 75,16 | 35,47 | 64,53 | 49,69 | 50,31 |
| 58 | 15,0 | 85,0 | 23,75 | 76,25 | 33,75 | 66,25 | 47,50 | 52,50 |
| 59 | 14,4 | 85,6 | 22,66 | 77,34 | 32,03 | 67,97 | 45,31 | 54,69 |
| 60 | 13,8 | 86,3 | 21,56 | 78,44 | 30,31 | 69,69 | 43,13 | 56,88 |
| 61 | 13,1 | 86,9 | 20,47 | 79,53 | 28,59 | 71,41 | 40,94 | 59,06 |
| 62 | 12,5 | 87,5 | 19,38 | 80,63 | 26,88 | 73,13 | 38,75 | 61,25 |
| 63 | 11,9 | 88,1 | 18,28 | 81,72 | 25,16 | 74,84 | 36,56 | 63,44 |
| 64 | 11,3 | 88,8 | 17,19 | 82,81 | 23,44 | 76,56 | 34,38 | 65,63 |
| 65 | 10,6 | 89,4 | 16,09 | 83,91 | 21,72 | 78,28 | 32,19 | 67,81 |
| 66 | 10 | 90 | 15 | 85 | 20 | 80 | 30 | 70 |